Kommunufelagið

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
23. juni 2017

Okkara j.nr.
17/01908-2

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr.
17/00430-3

**Viðv.: uppskoti til kunngerð um fyribyrging og týning av rottu**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til omanfyri nevnda uppskot til kunngerð, ið er sent felagnum til hoyringar.

Kommunufelagið fegnast um, at stig nú verða tikin til at gera nakað munagott fyri at koma trupulleikunum við rottu til lívs.

Sum liður í viðgerðini hevur Kommunufelagið sent uppskotið út til limakommunurnar til viðgerðar, og er hjálagt avrit av svari, ið er innkomið frá Runavíkar Kommunu.

Sjónarmiðini hjá Runavíkar kommunu falla í stóran mun saman við tí, sum Kommunufelagið hevur at viðmerkja í sambandi við uppskotið, men skal Kommunufelagið harumframt viðmerkja fylgjandi:

Sæð í mun til, hvussu relativt stóran leiklut kommunurnar skulu hava í uppskotinum til kunngerð – og sum tær hava í dag sambært lógini – so hevði Kommunufelagið yvirskipað fegin sæð, at felagið varð tikið við í tilgongdini, áðrenn uppskotið var liðugt, hetta fyri at umganga, at óneyðug tíð nú fer til at finna útav, hvussu reglurnar skulu umsitast í praksis.

Hetta skal eisini síggjast í ljósinum av, at tá reglerað verður í kunngerð, so eru ongar viðmerkingar at styðja seg til í eini ivastøðu.

Yvirskipað sæð tykist ógreitt í uppskotinum, hvussu ábyrgdarbýtið er millum kommunurnar og Umhvørvisstovuna, og eru fleiri dømi um hetta í uppskotinum, m.a. í § 2 stk. 2, § 5 stk. 3 og stk. 5, § 8, § 9, § 11 stk. 3, § 12 og § 14 stk. 2.

Eitt greitt ábyrgdarbýti er altíð ynskiligt millum land og kommunur. Møguliga hevur Heilsu- og Innlendismálaráðið svar uppá tað, sum Kommunufelagið sær sum ógreið viðurskifti, men mett verður ikki, at tey kunnu lesast útfrá tekstinum í kunngerðini.

Í § 1 stk. 2 er ásett, at aktingarfólk skulu vera fyri hvørja bygd og hvønn bý. Kommunufelagið metir, at eitt ábyrgdarfólk/aktingarfólk fyri hvørja kommunu, saman við útbreiddu fráboðanarskylduni í kunngerðini, er nóg mikið til at røkka endamálinum í lóg og kunngerð. Um Heilsu- og Innlendismálaráðið hevur serliga orsøk til at áseta krav um eitt aktingarfólk fyri hvørja bygd og hvønn bý, so ynskir Kommunufelagið fegið at hoyra hesar grundgevingar.

Kommunufelagið

Í § 13 er ásett, at avgerðir, undantikið avgerðir eftir § 11 stk. 2, ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. Kommunufelagið metir, at tað er ivasamt um avmarkingin í kærumøguleikanum er í samsvari við §§ 69 og 70 í umhvørvisverndarlógini, og mælir til, at hetta verður umhugsað av nýggjum.

Tað tykist óvanligt, at Umhvørvisstovan fær serligar heimildir mótvegis kommununum, tá hesar eru eigarar av lendi v.m. Tað er óneyðugt við slíkum ásetingum, tí kommunurnar eiga at hava sjálvjustits, í sama mun sum tær eru settar at hava myndugleikaábyrgd og eftirlit við øðrum í kommununum.

Tað tykist tí eisini heldur óvanligt at tað í § 14 stk. 2 í kunngerðini verður ásett ein heimild at revsa myndugleikan, ið skal umsita og partvíst hava eftirlit við kunngerðini mótvegis øðrum.

Fleiri staðni í uppskotinum verður víst til vegleiðing frá Umhvørvisstovuni um fyribyrging og týning av rottu. Í tann mun hesar vegleiðingar ikki longu eru tøkar, so sær Kommunufelagið tað sum eina sjálvfylgju, at kommunurnar eru við til at tilevna hesar vegleiðingar.

Vísandi til omanfyri standandi fer Kommunufelagið at biðja um fund við Heilsu- og Innlendismálaráðið og møguliga Umhvørvisstovuna at umrøða uppskotið, við tí endamáli at fáa greitt omanfyri nevndu ivamál og annars at tryggja, at myndugleikarnir hava eina felags fatan av, hvussu innihaldið skal útførast í verki, soleiðis at so fá ivamál sum gjørligt uppstanda, eftir at kunngerðin er sett í gildi.

Heitt verður tí samstundis á Heilsu- og Innlendismálaráðið um at bíða við at lýsa kunngerðina til fundur er hildin.

Vegna
Kommunufelagið

| | |
|---|---|
| Dennis Holm<br>Formaður | Eyðun Christiansen<br>Stjóri |